MENTAMÁLARÁÐIÐ

Dagfesting: 21. apríl 2016
Tygara ref.:
Máltal: 16/00719-4

# Vegleiðing til próvtøku eftir serligari fyriskipan

Í § 21 í kunngerð um próvtøkur fólkaskúlans[1] er álagt skúlastjóra at bjóða próvtakara við skerdum virkisførleika serligar próvtøkutreytir fyri at javnstilla hann við aðrar próvtakarar í próvtøkustøðuni. Skúlastjórin tekur avgerð um hetta eftir tilmæli frá Førleikastovuni ella Sernámi og í samráð við næmingin og foreldur. Próvstovan nýtist ikki at vera fráboðað uttan so at neyðugt er við tillagaðum uppgávum ella um ivamál eru.

## Hvør kann fara upp til próvtøku eftir serligari fyriskipan?

Tað er meginreglan og ein fortreyt, at tilboðið ikki hevur við sær, at próvtøkustøðið lækkar. Hóast serligar fyriskipanir verður hildið fast við endamálið við próvtøkuni, og at fakliga støðið ikki verður broytt. Sostatt er endamálið við serligu fyriskipanini at kompensera fyri serliga tørvinum hjá næminginum og ikki at gera serligu fyriskipanina fyri at kompensera fyri einum veikum fakligum støði hjá næminginum og harvið geva stuðul til at megna fakligu krøvini í próvtøkuni.
Í allar flestu førum hava næmingar, sum kunnu fara upp til próvtøku eftir serligar fyriskipan, fingið undirvísing og brúkt hjálparmiðlarnar í vanligu undirvísingini. Tað er ein treyt, at næmingurin kennir og dugir at brúka hjálparmiðlarnar, sum mælt verður til og at hesir verða brúktir í tí dagligu undirvísingini. Tískil ber ikki til hjá næmingi, sum "einans" hevur trupulleikar við stavseting, at brúka CD-orð til próvtøkuna/royndina, soleiðis at hann kann fáa eitt betur próvtøkuúrslit.

## Hvør er mannagongdin og hvør tekur avgerð?

Skúlastjórin hevur ábyrgdina av, at næmingur, sum hevur tørv á serligari fyriskipan til próvtøkuna, fær hetta í boði, og tekur avgerð um serliga fyriskipanin skal setast í verk. Førleikastovan metir í samráð við flokslæraran og í samráð við hinar lærararnar, um næmingur hevur tørv á serligari fyriskipan í einari ella fleiri próvtøkulærugreinum. Næmingurin og foreldur verða kunnað um niðurstøðuna og um møguleikarnar hjá næminginum at fara til próvtøku eftir serligari fyriskipan.

Førleikastovan letur skúlastjóranum eina tilráðing um, hvussu próvtøkan kann verða skipað.

Grundað á tilmæli og í samráð við foreldur og lærararnar í viðkomandi lærugreinum, tekur skúlastjórin avgerð um serligu fyriskipanina.

## Hvør hjálp kann verða veitt í hesum sambandi?

[1] Kunngerð nr. 15 frá 28. februar 2013 um próvtøkur fólkaskúlans

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☎ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

Serliga fyriskipanin kann fevna um próvtøkuhættir og karmar fyri próvtøkuna, m.a. at nýta serligar hjálparmiðlar ella tillagaðar uppgávur. Hjálparmiðlar, talan kann vera um, eru tilskilaðir í fylgiskjali 1 í próvtøkukunngerðini.[2]
Harumframt er loyvt orðblindum, ið hava tørv á tí, at nýta ljóðupptøku til skrivliga framseting t.d. við "Audacity". Loyvt er eisini at nýta "talu til tekst" forrit so sum "Dictus" ella "Dragon Dictation", sum tó ikki finnast á føroyskum, men t.d. á donskum og enskum.

*Hjásitari*
Hjásitarin skal stuðla, men skal vera so neutralur sum møguligt og skal ikki hjálpa at loysa fakliga innihaldið í uppgávuni. Leikluturin hjá hjásitaranum kann t.d. vera at stuðla næminginum, so hann fer í gongd við at gera uppgávurnar. Hjásitarin skal ikki lesa tekst upp, tá talgild hjálparamboð eru tøk.

*Eyka tíð*
Loyvt verður at leggja 1/3 av tíðini, sum vanliga próvtøkan er sett til, afturat sum eykatíð, tá ið talan er um serliga fyriskipan.

**Prógvið**
Tað verður ikki tilskilað í prógvið, at næmingurin hevur verið til próvtøku eftir serligari fyriskipan.

**Mentamálaráðið**

[2] Kunningarskriv dagf. 14. januar 2015 MMR

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo